# Flogbóltsstøður

## Meistaradeild, kvinnur

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | TB | 7 | 6 - 1 | 19 | 6 | 13 | 12 |
| 2 | Mjølnir | 6 | 3 - 3 | 12 | 11 | 1 | 6 |
| 3 | ÍF | 6 | 3 - 3 | 12 | 12 | 0 | 6 |
| 4 | Dráttur | 5 | 2 - 3 | 9 | 11 | -2 | 4 |
| 5 | Fleyr | 6 | 1 - 5 | 5 | 17 | -12 | 2 |

## Meistaradeild, menn

| | | dystir | v - t | vunnin sett | tapt sett | sett-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | Fram | 7 | 6 - 1 | 19 | 10 | 9 | 12 |
| 2 | SÍ | 6 | 5 - 1 | 16 | 6 | 10 | 10 |
| 3 | Fleyr | 6 | 3 - 3 | 12 | 12 | 0 | 6 |
| 4 | Mjølnir | 6 | 2 - 4 | 11 | 14 | -3 | 4 |
| 5 | ÍF | 7 | 0 - 7 | 5 | 21 | -16 | 0 |

## Støðan 1. deild kvinnur

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 9 - 0 - 0 | 263 | 158 | 105 | 18 |
| 2 | Stjørnan | 9 | 8 - 0 - 1 | 254 | 187 | 67 | 16 |
| 3 | Neistin | 9 | 6 - 0 - 3 | 197 | 175 | 22 | 12 |
| 4 | VB | 8 | 4 - 0 - 4 | 198 | 198 | 0 | 8 |
| 5 | Sóljan | 9 | 2 - 0 - 7 | 185 | 255 | -70 | 4 |
| 6 | Kyndil | 10 | 1 - 0 - 9 | 218 | 269 | -51 | 2 |
| 7 | StÍF | 8 | 1 - 0 - 7 | 133 | 206 | -73 | 2 |

## Støðan 1. deild menn

| | | dystir | v - j - t | vunnin mál | tapt mál | mál-munur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | VÍF | 9 | 8 - 1 - 0 | 261 | 207 | 54 | 17 |
| 2 | Neistin | 9 | 7 - 2 - 0 | 274 | 232 | 42 | 16 |
| 3 | H71 | 10 | 5 - 1 - 4 | 270 | 271 | -1 | 11 |
| 4 | StÍF | 10 | 3 - 1 - 6 | 270 | 271 | -1 | 7 |
| 5 | Tjaldur | 9 | 2 - 2 - 5 | 218 | 246 | -28 | 6 |
| 6 | KÍF | 9 | 2 - 1 - 6 | 228 | 258 | -30 | 5 |
| 7 | Kyndil | 10 | 2 - 0 - 8 | 230 | 266 | -36 | 4 |

## Máltindarnir

**Kvinnur:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Simona Dziugyte | Stjørnan | 96 | (28) |
| Asta Petrauskine | Sóljan | 81 | (9) |
| Gabriella Fekete | VB | 81 | (21) |
| Lotte Sørensen | Kyndil | 72 | (28) |
| Ioana Rápa | VÍF | 54 | (14) |
| Katrin á Neystabø | Neistin | 47 | (21) |
| Anna K. Samson | Stjørnan | 44 | (1) |
| Joan M. Joensen | Stjørnan | 42 | |
| Jacklin Durhuus | VÍF | 42 | (3) |
| Annika Ljósstein | Kyndil | 42 | (9) |
| Nicoleta Radu | VÍF | 40 | |
| Andrijana Milodanovic | Stjørnan | 40 | (4) |
| Sóley Mikkelsen | VÍF | 40 | (5) |
| Birita Wardum | Neistin | 39 | (3) |
| Ileana Manulescu | StÍF | 39 | (4) |

**Menn:**

| | | | |
|---|---|---|---|
| Costin Dumitrescu | StÍF | 72 | (22) |
| Finnur Hansson | H71 | 62 | (18) |
| Høgni Klein | Kyndil | 59 | (3) |
| Sámal Joensen | VÍF | 59 | (10) |
| Jacob Jónsson | Neistin | 58 | (6) |
| Halgir Dahl Olesen | H71 | 58 | (10) |
| Bjarni Wardum | H71 | 57 | (12) |
| Heini Joensen | Neistin | 53 | (17) |
| Dragisa Stojovic | Tjaldur | 51 | |
| Ingi Olsen | VÍF | 51 | (7) |
| Dorica Tomic | KÍF | 45 | (12) |
| Artur Johansen | StÍF | 42 | |
| Hans Áki Dal-Christiansen | Neistin | 42 | (6) |
| Mortan Hansen | Tjaldur | 41 | (4) |
| Jónleif Sólsker | Kyndil | 40 | (15) |

Kyndil-VÍF 23-19 (11-9)

# Meistararnir spardu seg

**Talan varð ikki um nakað sorl í Vestmanna, men heimaliðið hevði alla tíðina tamarhald á, tá Kyndil vitjaði føroyameistararnar**

HONDBÓLTUR – KVINNUR
*Jákup Mørk*

Vit skrivaðu leygardagin, at alt annað enn ein tryggur sigur ti VÍF í dystinum móti Kyndli var óhugsandi. Talan gjørdist eisini um ein sigur, og tó at hann ikki var so trivaligur í tølum, so er einki at ivast í, at hann var tryggur.



*Kyndil stríddist alla tíðina sera væl, men fyri tða mesta tóktist VÍF kortini at hava heilt gott tak á dystinum*

*Mynd: Álvur Haraldsen*

### Spardu seg

Tað var longu frá byrjan greitt, at VÍF í ávísan mun hevði valt at spara upp á fólkið til hendan dystin.

Soleiðis vóru bæði Manuela Stan og Ioana Rápa fyri tað allar mesta á beinkinum, og ikki ein gongd ein bragdlig kyndilsbyrjan kundi fáa venjararnar at royna seg við nøkrum útskiftingum.

Kyndil helt seg nevnliga á odda fyrstu 25 minutt-irnar, men hóast hetta, so tóktist tað alla tíðina soleiðis, at VÍF kundi seta meira á, um hugurin var til tess.

Fyrstu løtuna av seinna hálvleiki øktu tær á heimaliðnum alt fyri eitt um munin, og tó at Kyndil framvegis hekk í, so hevði heimaliðið skil á tí mesta, sum fyrifórst úti á vøllinum. Eitt skifti fekk Kyndil tó minkað munin niður aftur í tvey mál, men eftir at VÍF tá framdi nakrar útskiftingar, so liðið nú líktist idealuppstillingini, varð alt sett upp á pláss seinastu seks-sjey minuttirnar.

### Fleiri glottar

Komandi vikuskifti skal VÍF spæla oddadyst í Klaksvík, men avrikið sunnudagin er neyvan nakað haldgott grundarlag at gera nakra veruliga meting um, hvussu dysturin móti Stjørnuni fer at spæla av.

Tað er tó einki dulsmál, at fyri VÍF mundi tað koma væl við, at tey aftur fingu høvi at hvíla týdningarmiklar leikarar. Skaðar eru spakuliga farnir at gera um seg í hópinum, og neyðugt er uttan iva at fáa hesar í rættlag, um drúgva sigursgongdin frá í fjør skal endurtakast.

Hóast Kyndil sum so ikki kundi gera so øgiliga nógv við VÍF í dystinum, so skerst ikki burtur, at fleiri glottar kortini vóru at hóma. Stríðsviljin var betri, enn hann hevur verið í undanfarnu dystunum,og so styrkir tað sjálvandi um, at Rakul N. Joensen nú aftur er at síggja á vøllinum.

Tað er tó ikki nóg mikið hjá Kyndli, at tær stríðast væl ímóti oddaliðunum í deildini, um liðið ikki skal koma í óhugsandi støðuna sum ein niðurflyting vildi verið. Her eru tað fyrst og frems Sóljan og StÍF, sum tær skulu stríðast ímóti, og í teimum dystum, sum Kyndil hevur tapt móti hesum, hevur viljin at vinna snøgt sagt ikki verið nóg stórur.

Hvørt hesin er batnaður, fæst kanska ein ábending um um tvær vikur, tá Kyndil vitjar á Skála, men áðrenn tað er eisini heimadysturin móti VB á skránni, og ivaleyst vilja tær í Kyndli royna at fáa okkurt burtur úr hesum.

### Dysturin í tølum

**VÍF-Kyndil 23-19 (11-9)**

Málskjúttar:
VÍF: Sóley Mikkelsen 5(1), Nicoleta Radu 5, Jacklin Durhuus 4(1), Fríða Marjunardóttir 3, Barbara á Rógvu 2, Ioana Rápa 2, Alis Høghamar 1, Nicolina Eyðbjørnsdóttir 1
Kyndil: Lotte Sørensen 0(5), Annika Ljósstein 4, Palma Petersen 2, Rakul N. Joensen 2, Marjun Tróndarson 1, Ann Hansen 1
Brotskøst: VÍF 2, Kyndil 5
Útvísingar: VÍF 2, Kyndil 5
Dómarar úr Tjaldri: Kári Hansen & Trúgvi Mortensen. Høvdu sum so ikki teir stóru spurningarnar at taka støðu til.

# U-21 kapping í Føroyum

**Heimsmeistararnir úr Russlandi verða millum mótstøðuliðni hjá føroyska U-21 landsliðnum í manshondbólti**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*

Fýra ár eru liðin, síðani HSF av álvara fór undir arbeiðið við yngru landsliðnum, og fyri núverandi U-21 árgangin merkir hetta, at tey eru tey fyrstu, sum nú hava veirð ígjøgnum alla landsliðsskipanina hjá HSF.

Ein kapping er eftir fyri teirra viðkomandi, og nú er líkt til, at liðið sleppur at runda av í Føroyum.

Lutakastið vildi tað soleiðis, at Føroyar komu í bólk við Russlandi, Jugoslavia og Cypern, og hesi hava heitt á Føroyar um at skipa fyri kappingini.

Petur Ove Petersen, formaður í HSF, sigur við Sosialin, at talan helst veðrur um eina kapping her heima, og at hendan væntandi verður í mei mánaði.

Um útlitini fyri kappingina er annars at siga, at okkara menn neyvan skulu gera sær alt ov stórar vónir um at fáa stig burtur úr dystunum.

Russland kemur higar við einum liði, sum kann rópa seg heimsmeistara, og tó at Jugoslavia ikki vann seg til endaspælið seinast, er lítið at ivast í, at talan er um eitt rættiliga sterkt lið .Tað sama er helst eisini galdandi fyri Cypern, sum hevur havt stóra framgongd seinnu árini, og millum annað hava cypriotar vunnið trygt á føroysku dreingjunum, tá liðini hava kappst í yngru bólkunum.




## Skrivstovufólk

Søkt verður eftir skrivstovufólki til avgreiðsluna á býráðsskrivstovuni til setan 15. januar 2002 ella skjótast eftir hetta.

Starvsøkið fevnir um at taka sær avgreiðsluni/telefonavgreiðsluni, kassa, fólkayvirliti og annars alt fyrifallandi arbeiði á skrivstouni.

Umsøkjari við royndum frá almennari fyrisiting ella øðrum skrivstovuarbneiði hevur fyrimun.

Starvið verður lønt sambært sáttmála millum Starvsmannafelagið og Kommunala arbeiðsgevarafelagið.

Meira fæst at vita um starvið við at venda sær til Jákup Frants Larsen, býráðsskrivara á telefon 444006 lokal 11.

Umsóknir saman við prógvum og møguligum viðmælum og upplýsningum um royndir skulu verða Fuglafjarðar kommunu, Norður í Gerði 10B, 530 Fuglafjørður í hendi í seinasta lagi **týsdagin 18. desember 2001 kl. 15.00**

*Fuglafjørður, tann 29. november 2001*

**Fuglafjarðar býráð**



## Námsfrøðingur

Søkt verður eftir einum námsfrøðingi til dagrøktarskipanina í kommununi at byrja 15. januar 2002.

Arbeiðsøkið hjá viðkomandi kemur at verða í og út frá spælistovuni, og at vera til hjálpar hjá dagrøktarmammunum og leiðaranum.

Skrivlig umsókn skal vera kommununi í hendi í seinasta lagi 17. des. 2001.

**Vestmanna kommuna**






Hevur tú:
✔ Høvuðpínu
✔ Læsta øksl
✔ Músa-arm
✔ Knýttar vøddar o.a.
✔ Ynski um økta vælveru

(Viðgerðartilboðið kann eisini fáast sum gávukort)

**Hervør Jacobsen**
Læknaexam. Muskelterapeut
Tel. 213034 eftir kl. 16.00 vanl. gerandisdagar, tó ikki hósdag.

Vikublaðið 321000



mbf

## MBF søkir dagligan leiðara

Meginfelag teirra brekaðu í Føroyum (MBF) søkir dagligan leiðara at seta frá 1. jan. 2002 ella eftir nærrri avtalu.

**Vit bjóða:**
- eitt fulltíðarstarv ella 3/4 tíð - um ynskist. Fyrsta árið er royndarár.
- eitt áhugavert, mennandi og fjølbroytt arbeiði við nógvum avbjóðingum, ið m. a. fevnir um samskifti við limafeløgini, almennar myndugleikar og luttøku í norðurlendskum samstarvi,
- løn sambært galdandi sáttmála við avvarðandi yrkisfelag ella eftir nærri avtalu.

**Vit vænta, at tú**
- hevur áhuga og kunnleika fyri arbeiðinum innan brekaðøkið
- hevur útbúgving sum sosialráðgevi ella líknandi
- hevur kunnleika til lógarverkið, ið er galdandi fyri hetta økið.
- hevur góð samstarvsevnir
- hevur kunnleika til umsitingarligt arbeiði og dugir at arbeiða sjálvstøðugt
- dugir væl at samskifta á føroyskum, donskum og enskum og hevur góðan teldufiørleika.

MBF er meginfelag fyri 22 ymisk feløg. Starvsnevndin setir og loysir dagliga leiðaran úr starvið, og leiðarin arbeiðir undir leiðslu nevndarinna.

Umsókn við relevantum skjølum verður at senda til MBF, Íslandsvegur 10c, 100 Tórshavn, merkt **Umsókn, innan 17. des. 2001.**

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til MBF-skrivstovuna, tlf. 317373 ella á e-mail: mbf@post.olivant.fo








## Nýggjar TANNPROTESUR

**Broytingar og umvælingar av gomlum protesum**

Kliniskur tannteknikari
**BERGUR Á REYNATRØÐ**
Børkuvegur, 620 Runavík
**Tlf. 448480**
Opið er mánadag-fríggjadag frá kl. 9-16



**Almanna- og Heilsumálastýrið**
*Starvsfólkadeildin*

Vegna ov fáar umsóknir verður starvið sum deildarstjóri lýst leyst av nýggjum.

## Deildarstjóri

### til Almanna- og heilsumálastýrið

Eitt starv sum deildarstjóri í Almanna- og heilsumálastýrinum, við tænastu inntil víðari á Almannadeildini, verður við hesum lýst leyst til setan skjótast tilber eftir nærri avtalu.

Talan er um nýggja deild, sum deildarstjórin saman við starvsfólkunum kemur at byggja upp. Tann, sum settur verður, verður sjálvur við til at mynda starvið, og fær góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Av tí at bygnaðarbroytingar fara fram í stýrinum, má tann sum settur verður tola broytingar.

Á almannadeildini starvast løgfrøðingar, fíggjarfólk og fólk við aðrari hægri útbúgving.

**Høvuðsuppgávur:**
- Ábyrgd av dagligu leiðsluni á deildini.
- Ábyrgd av løgfrøðisliga og fíggjarliga arbeiðnum innan økið.
- Ábyrgd av viðgerð av kærum, sum ikki eru lagdar til kærustovn.
- Veita ráðgeving til stovnarnar innan økið
- Aðrar fyri starvið viðkomandi uppgávur.

**Fyrimun hevur umsøkjari sum hevur:**
- Útbúgving frá hægri lærustovni
- Leiðsluroyndir, nútíðar leiðslueginleikar.
- Kunnleika til almannaøki.
- Evni at seta í verk fyriskipanir.
- Evni at eggja og menna leiðarar og starvsfólk.
- Góð samstarvsevni.
- Vitan um tær treytir sum eru galdandi í einari politiskari fyrisiting.

**Løn og setanartreytir:**
Tann setti hevur tilvísing til aðalstjóran, og er á linju við hinar deildarstjórarnar í aðalstýrinum.

Setanarøki er alt aðalstýrið við tilhoyrandi stovnum umframt Løgmansskrivstovan og hini aðalstýrini.

Talan er um tænastumannastarv, við setanartreytum sambært løgtingslóg um tænastumenn landsins.
Starvið verður lønt í 37. lønarflokki.

**Umsóknir:**
Umsókn við avriti av prógvum, C.V. o.ø. skulu sendast til:

**Almanna- og heilsumálastýrið**
att. Starvsfólkadeildin
Eirargarður 2
FR-110 Tórshavn.

*Umsóknarfreist: 17. december 2001 kl. 12.00*

Nærri fæst at vita um starvið við at venda sær til Aibritt á Plógv, aðalstjóra tlf. 304050.